Samanumtøka

Veðurlagsdagur 2025

Alment tiltak týsdagin 18. mars 2025, Kongshøll, Tórshavn

Umhvørvisstovan, Havstovan, Jarðfeingi, Tjóðsavnið, Landsverk, FIRUM
Hagstova Føroya, Veðurstova Føroya og Fróðskaparsetur Føroya skipaðu fyri

Tórshavn, september 2025

Innihaldsyvirlit

Innihaldsyvirlit **1**

Innleiðing **2**

Skrá fyri Veðurlagsdagin 2025 ..... **5**

Vælkomin **6**

Samandráttir av framløgum **7**

INNLEIÐING **8**

Veðurmátingar gjøgnum 152 ár 8

Um ávísar fyri veðurlagsbroytingar 9

DRÍVARAR *// DRIVERS* **10**

Samlað útlát av vakstrarhúsgassi frá tjóðarbúskapinum 10

ÁVIRKAN *// IMPACT* **11**

Hækkandi sjóvarmáli 11

Miðalsúrleiki í sjógvi 13

Reyðlistavísital 14

Veðurlagsbroytingar og ávirkan á flutning 15

VIÐBREKNI *// VULNERABILITY* **16**

Oyggjar viðbreknar fyri veðurlagsbroytingum 16

ÁTØK *// MITIGATION* **17**

Orku- og veðurlagspolitikkir 17

Stuðul til steinrunnin (fossil) brennievni í Føroyum 18

TILLAGING *// ADAPTATION* **19**

Skipan av veðurmátingum 19

Samanumtøka **20**

Lagt til rættis: Umhvørvisstovan, Havstovan, Jarðfeingi, Tjóðsavnið, Landsverk, Hagstova Føroya og Veðurstova Føroya, FIRUM og Fróðskaparsetur Føroya. **Ritstjóri:** Maria Gunnleivsdóttir Hansen. **Útgevari:** Umhvørvisstovan. **Ár:** 2025.

Loyvt er at nýta tilfarið úr ritinum, um bert keldan verður upplýst.

ISBN nr.: 978-99972-50-12-4

Innleiðing

Á ársins Veðurlagsdegi í Kongshøll 18. mars 2025 varð ljós serliga varpað á altjóða viðurkendar ávísar – *indikatorar* – fyri veðurlagsbroytingar, sum kunnu brúkast til at vísa og geva grundarlag fyri at samanbera, hvussu lond handfara avbjóðingar, ið veðurlagskreppan hevur við sær. Við útgangsstøði í ST-ávísum um veðurlagsbroytingar løgdu fakfólk fram og hugleiddu um, hvussu vit her á landi í breiðum høpi handfara veðurlagsbroytingar.

Ritið, tú her lesur, er ein samanumtøka av Veðurlagsdegnum 2025, við m.a. samandráttum av øllum framløgunum.

Aðalspurningar á Veðurlagsdegnum 2025:

Hvussu handfara vit veðurlagsbroytingar? Hvussu standa Føroyar seg við broytandi veðurlagi? Hvat kunnu vit vísa á er gjørt? Eru vit fyrireikað?
Hvat verður gjørt fyri at máta gongdina í veðurlagsbroytingum?

Hetta eru stórir spurningar, sum ikki kunnu svarast fult og heilt á einum Veðurlagsdegi ella í einum riti sum hesum. Her verður tó roynt, við støði í dátum og vitan, sum varð løgd fram á Veðurlagsdegnum, at geva boð uppá nøkur svar. Í alt 10 tilhoyrandi tilmæli eru orðað. Les nærri í frágreiðingini um øll hesi viðurskifti. Eins og skráin á degnum er tilmælið sett upp eftir teimum fimm IPCC-høvuðsflokkunum: DRÍVARAR, ÁVIRKAN, VIÐBREKNI, ÁTØK og TILLAGINGAR.

Niðurstøður og 10 tilmæli

Tað er stórur tørvur á, at heimurin og ikki minst eisini vit í Føroyum taka veðurlagsbroytingar í størri álvara.

Nýtslan av olju er framvegis størsti **DRÍVARIN**. Tess størri oljunýtsla, jú størri útlát.

- **1. tilmæli:** Mælt verður til, at allar dátur til at gera upp útlát gerast tøkar, t.d. olja, sum føroyskar fyritøkur bunkra í øðrum londum.

Eins og í øðrum londum sæst **ÁVIRKAN** av veðurlagsbroytingum eisini í Føroyum, herundir eisini ***prógv um veðurlagsbroytingar***. Gongdin er, at føroyski miðalhitin veksur og vatnstøðan hækkar. Ein álvarlig ávirkan, ikki minst fyri fiskivinnuna, er súrgan av sjónum. Fyribils úrslit vísa, at føroyskur sjógvur súrnar við væntaðari ferð.

- **2. tilmæli:** Vit eiga at halda áfram at gera veðurmátingar fyri Føroyar og viðgera mátingarnar á besta hátt
- **3. tilmæli:** Mælt verður til víðari greining av føroyskum vatnstøðumátingum. Serliga skal miðast ímóti, at sameina tíðarrøðina hjá DMI við núverandi vatnstøðumátingum í Havn.
- **4. tilmæli:** Mælt verður til at víðka innsavningina av dátum um havsúrgan. Landgrunnurin eigur at kannast. Nýggjari tøkni eigur at verða fingin til vega.

Eisini í Føroyum síggjast ávirkanir á ***útbreiðslu og støðu hjá djóra- og plantusløgum.*** Reyðlista-vísitalið vísir eitt lítið neiligt rák árini 1993-2020, sum merkir, at alt fleiri sløg av plantum og djórum eru í størri vanda fyri at doyggja út.

➔ **5. tilmæli:** Stovnar, sum umsita dátur um lívfrøðiliga fjølbroytni í Føroyum, eiga at samstarva um at gera reyðlista og rokna út reyðlistavísital.

Landsverk hevur fleiri dømi um, at ***veðurlagsbroytingar ávirka flutning.*** Hvørt ár eru omanlop, áarlop, skriðulop, skalvalop og brim, sum ávirka flutningskervið í størri og minni mun.

➔ **6. tilmæli:** Mælt verður til at víðka innsavning av dátum fyri vatnstøðu og áhaldandi váðameta í mun til, hvar omanlop og brim kunnu væntast.

Føroyar eru **VIÐBREKNAR** fyri veðurlagsbroytingum. Sjóvarmálin hækkar støðugt, og hetta er umráðandi at hava atlit at í mun til láglendir, útbygging av vegakervi og aðra bygging nær við sjóvarmálan.

➔ **7. tilmæli:** Mælt verður til at gera alment atkomuliga GIS-kortskipan, sum vísir, hvørji økir í Føroyum verða rakt av fløðandi sjóvarmála.

At seta **ÁTØK** í verk er neyðugt fyri at minka um útlátið av vakstrarhúsgassi, ikki minst at skerja nýtsluna av steinrunnum - *fossilum* - brennievni, serliga olju. Føroyar hava ein orku- og veðurlagspolitikk við 23 átøkum, sum skal stuðla undir, at útlátið í 2032 verður 30 % lægri enn útlátið av vakstrarhúsgassi í 2010.

Ein liður í at minka um útlátið av vakstrarhúsgassi er at steðga almennum stuðli til steinrunnin brennievni fyri at skunda undir eina umlegging til grøna orku og burðardygga menning. Í Føroyum fær fiskiflotin almennan stuðul til fossil brennievni, eitt nú við undantøkum frá brennioljugjaldi fyri fiskiflotan. Hetta meðan grannalond hava sett í verk CO_2-gjøld fyri fiskiflotan. Um brennioljugjaldið á 1 kr./l var galdandi fyri fiskiflotan, vóru 85 mió. kr. eyka komnar í landskassan.

➔ **8. tilmæli:** Tørvur er á at endurskoða orku- og veðurlagspolitikkin og at leggja nýggj átøk afturat

➔ **9. tilmæli:** Mælt verður til at fylgja grannalondunum og seta CO_2-gjald á fiskiflotan

Broytingar í veðurlagnum gera tað neyðugt í størri ella minni mun at gera **TILLAGINGAR**. Neyðugt er, at lond hava veðurfrøðiligar mátistøðir og aðrar nøktandi skipanir til at halda eyga við veðurlagsbroytingum. Samanhangandi veðurmátingar hava verið gjørdar fyri Tórshavn/-Hoyvík síðan í oktober í 1872. Í dag verður arbeitt fram móti at lúka øll WMO-krøv á fleiri lokalitetum, so mátingarnar kunnu stuðla hvør aðrari.

➔ **10. tilmæli:** Hildið verður á at gera veðurmátingar, sum liva upp til galdandi WMO-krøv

Samanumtikið er tørvur á betri handfaring av veðurlagsbroytingum í Føroyum. Tørvur er á einum meira samskipaðum arbeiði, bæði fyri betri at fylgja við broytingum, og fyri at verða meira fyrireikað og gera møguligar neyðugar tillagingar til broytingar í veðurlagnum. Meira ferð eigur eisini at verða sett á arbeiðið at seta átøk í verk at minka útlátið.

Veðurlagsdagurin er eitt afturvendandi tiltak, sum verður fyriskipað av einum "veðurlags-bólki", sum Umhvørvisstovan tók stig til í 2022, og sum seinasta árið hevur verið mannaður við hesum limum: Karin Margretha Húsgarð Larsen frá Havstovuni, Bárður A. Niclasen frá Veðurstovu Føroya, Áki Vang frá Tjóðsavninum, Eyð Maritudóttir Grønadal frá Hagstovuni, Sølvi Sjúrðarson frá Landsverki, Lis Mortensen og Bartal Højgaard frá Jarðfeingi, Sigurd

Christiansen frá Fróðskaparsetri Føroya, Sissal Vágsheyg Erenbjerg frá FIRUM og Sigurð í Jákupsstovu, Erika Høgnadóttir Andersen, Katrin Hoydal, Hergeir Teitsson og Maria Gunnleivsdóttir Hansen frá Umhvørvisstovuni.

Fyriskipararnir ynskja við hesum, at vitan, sum varð løgd fram á Veðurlagsdegnum, er alment atkomulig, og at øll áhugað kunnu fáa betri innlit í hesi viðurskifti og fáa atgongd til dátur og tíðarrøðir, sum á einhvønn hátt lýsa føroyska veðurlagið, veðurlagsbroytingar og annað viðkomandi.

Øll eru vælkomin at seta seg í samband við Umhvørvisstovuna us@us.fo ella limir í arbeiðsbólkinum við spurningum ella viðmerkingum.

Vegna arbeiðsbólkin

Umhvørvisstovan

Skrá fyri Veðurlagsdagin 2025

Kl.	Evni
13:00	**Vælkomin** *Margit Stórá, Landsstýriskvinna*
	Innleiðing
13:10	**Um veðurlagsdagin 2025** *Sigurð í Jákupsstovu, Umhvørvisstovan*
13:15	**Veðurmátingar gjøgnum 152 ár** *Turið Laksá, Veðurstova Føroya*
13:30	**Um ávísar fyri veðurlagsbroytingar** *Eyð Maritudóttir Grønadal, Hagstovan*
	Ávísar
13:40	**Drívarar // Drivers** ***Samlað útlát av vakstrarhúsgassi** // Total greenhouse gas emissions* **Ávísi nr. 4 Samlaða útlátið av vakstrarhúsgassi frá tjóðarbúskapinum** // Total greenhouse gas emissions from the national economy *Maria Gunnleivsdóttir Hansen, Umhvørvisstovan*
13:55 **14:10** **14:25** **14:40**	**Ávirkan // Impacts** ***Tekin um veðurlagsbroytingar** // Climate change evidence* **Ávísi nr. 47 Hækkandi sjóvarmáli** // Sea-level rise *Hergeir Teitsson, Umhvørvisstovan og Sissal V. Erenbjerg, FIRUM* **Ávísi nr. 49 Miðalsúrleik í sjógvi (pH)** // Average marine acidity (pH) measured at agreed suite of representative sampling stations *Ian Salter, Havstovan* ***Útbreiðsla og støða hjá sløgum** // Distribution and status of species* **Ávísi nr. 63 Reyðlistavísital** // Red List index *Áki Vang, Tjóðsavnið* ***Veðurlagsbroytingar og alneyðugt infrakervi** // Climate change impacts on transport and critical infrastructure* **Ávísi nr. 77 Veðurlagsbroytingar og ávirkan á flutning** // Impacts of climate change on transport *Sølvi Sjúrðarson, Landsverk*
14:50	***Steðgur (20 min.)***
15:10	**Viðbrekni // Vulnerability** ***Øki viðbrekin fyri veðurlagsbroytingum** // Area of country vulnerable to climate change* **Ávísi nr. 107 Oyggjar viðbreknar fyri veðurlagsbroytingum** // Islands vulnerable to climate change *Lis Mortensen, Jarðfeingi*
15:25	**Átøk // Mitigation** ***Veðurlagsbroytingar - politikkir og ætlanir um átøk** // Climate change mitigation policies, strategies and plans* **Ávísi nr. 114 Orku- og veðurlagspolitikkir** // Low-carbon development strategies and plans *Sigurð í Jákupsstovu, Umhvørvisstovan* **Ávísi nr. 115 Umlegging ella avtøka av almennum stuðli til steinrunnin brennievni** // Reforming or phasing out of government support for fossil fuels, *Hans Ellefsen, Fróðskaparsetur Føroya*
15:55	**Tillaging // Adapation** ***Yvirvøka av veðurlagsbroytingum** // Climate change monitoring* **Ávísi nr. 151 Skipan av veðurmátingum** // Meteorological monitoring network *Bárður A. Niclasen, Veðurstova Føroya*
16:25	**Samanumtøka**
	Við støði í dagsins framløgum, verður tikið samanum *Marita Rasmussen, Havstovan*
16:30	**Endi**

Vælkomin

Eftir áheitan hevði Margit Stórá, landsstýriskvinna, játtað at bjóða vælkomin til veðurlagsdagin. Her er røða hennara:

Góðan dag tit luttakandi á veðurlagsdegnum 2025. Takk fyri, at tit skipa fyri hesum tiltakinum, og takk fyri, at tit geva mær høvi til at siga nøkur orð, nú byrjað verður. Veðurlagsbroytingar og tær hóttanir, sum standast av hesum, hava vit sett á politiska breddan seinastu árini, ásannandi týdningin at fáa gjørt nakað við hetta – her hjá okkum og um allan heimin - samanfatað í 13. heimsmálinum hjá ST um burðardygga framtíð. Tað gav tí at bíta, at nýggi leiðarin í USA ikki meira enn var komin framat, so suspenderaði hann teirra luttøku í Parísavtaluni, sum var ein av teimum týdningarmiklu avtalunum, ið gjørdar vóru fyri at gera nakað munagott við veðurlagsbroytingarnar. Týðiligt tekin frá honum til heimin, at slíkt var eingin grund til at brúka tíð uppá. Tað gingu nú heldur ikki nógvir dagar, so fingu vit á tingi eisini eitt uppskot um at eggja meira til oljuleiting her hjá okkum, eins og har yviri var eggjað til at bora og bora – *drill baby, drill*. Tað blæsur í løtuni eitt ógvisligt mótrák vestanífrá móti arbeiðinum við at byrgja fyri veðurlagsbroytingunum. Tí hevur hesin veðurlagsdagurin í dag, í ár, nógv størri týdning, enn vit geva okkum far um. Tað er av sera stórum týdningi, at vit stremba eftir at menna vitan og tilvitan um veðurlag og veðurlagsbroytingar her hjá okkum. Soleiðis, at vit eru betur fyri at møta teimum avbjóðingum, sum liggja fyri framman, samstundis sum vit fáa betri grundarlag fyri at fremja neyðug fyribyrgjandi tiltøk. Tað er gleðiligt og gott og av alstórum týdningi, at okkara vitanarstovnar kunnu samstarva og deila og breiða út tøka vitan, - tí bara við at samstarva kunnu vit fáa tað besta burtur úr. Takk til tykkum, sum skipa Veðurlagsdagin 2025 - eitt samstarv millum Umhvørvisstovuna, Veðurstovuna, Havstovuna, Hagstovuna, Landsverk, Fróðskaparsetrið, Tjóðsavnið, Jarðfeingi og Firum. Um vit skulu arbeiða ítøkiliga við veðurlagsbroytingum í Føroyum, mugu vit vita, hvørji tekin síggjast her um leiðir. Skulu vit hava almenningin við í arbeiðið at tálma veðurlagsbroytingarnar – og tað mugu vit – so skulu vit fortelja almenninginum, hvat er upp á spæl. Her haldi eg, at vit øll hava eina stóra uppgávu fyri framman, tí hesin boðskapurin hevur ikki fingið tað neyðuga rótfestið millum fólki her á landi. Nú eri eg nýggj, í mun til at hava hetta ábyrgdarøkið politiskt, einki nýtt í tí. Men hetta er eitt øki, har eg havi merkt, at tað ikki er vitanin frá granskingini ella teimum serkønu, sum livir millum fólk. Heldur eru tað mong, sum, tá tosað verður um veðurlagsbroytingar og hvat vit mugu gera við tað, heldur taka sítt útgangsstøði í heimabryggjaðum sannleikum, bygt á gomul ella beinleiðis skeiv fakta. Givið er, at vit eru eitt sindur í andróðri at breiða út nýggjasta kunnleikan, tá ið stórveldisleiðari purrar undir, at vit síggja trøll á alljósum degi og sáplar niður alt arbeiði á veðurlagsøkinum. Umráðandi er, at vit framhaldandi gera okkum greitt, hvat tað er, sum drívur broytingarnar, vit mugu greina hvørja ávirkan broytingarnar hava á okkara nærumhvørvi, vit mugu fáa greiðu á, hvussu viðbrekið okkara nærumhvørvi er, og vit mugu gera okkara til at avmarka og tálma komandi broytingarnar. Vit mugu so sanniliga eisini gera okkum greitt - vit øll somul – tit, sum sita við hesi umfatandi vitan og vit politikarar - at tað skal brúkast meira og áhaldandi orka til at

gerandisgera hesa fakligu vitan, so fólkið sær seg aftur og skilir týdningin av, at vit mugu gera átøk fyri at tálma tær frammanfyri standandi veðurlagsbroytingarnar. Tit eru okkara vitan lykil til, hvussu standurin er, og við kunnleika um, hvat vit skulu og eiga at gera. Eg eri stolt av tykkum og tykkara arbeiði. Enn einaferð takk fyri og góðan arbeiðshug - eg eri spent at frætta um tað, tit fara at leggja fram í dag. Takk fyri

Margit Stórá, landsstýriskvinna í umhvørvismálum

Eftir framløguna hjá Margit bjóðaði Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á Umhvørvisstovuni, eisini vælkomin og greiddi frá skránni fyri veðurlagsdagin.

Samandráttir av framløgum

Á næstu síðunum eru samandráttir av øllum framløgunum, sum vórðu hildnar á veðurlags-degnum 2024. Samandráttirnir eru settir upp í somu raðfylgju, sum framløgurnar standa í skránni, sí s. 4. Umframt stuttan samandrátt, er roynt at fáa til vega upplýsingar um atgongd til viðkomandi dátur, serliga tíðarrøðir ella annað viðkomandi.

INNLEIÐING

Veðurmátingar gjøgnum 152 ár	
Turið Laksá, Veðurstova Føroyar	
Samandráttur	Veðurmátingar hava verið gjørdar í Tórshavn/Hoyvík síðani oktober 1872. Hitamátingar hava vit í øllum tíðarskeiðinum 1873-2024. Her er tendensurin, at miðalhitin veksur, hitametini eru støðug, meðan kuldametini verða heitari við tíðini. Mátingar í avfall hava vit í tíðarskeiðinum 1890-2024. Her er tendensurin, at regnmongdin er støðug, men 24-tíma regnintensiteturin er vaksandi. Vindmátingar hava vit í ymiskum tíðarskeiðum (árliga 1958-2024, miðalvind 2000-2024, mesti miðalvindur og harðastu hvirlur 2014-2024), men dáta manglar frá 2018-2020. Tað er tí ringt at gera nakra endaliga niðurstøðu uppá, hvat vindurin broytist. Tendensurin er, at miðalvindurin er støðugur, meðan mesti miðalvindurin tykist at økjast. Hetta skal tó takast við fyrivarni og eftirkannast við betri dáta og longri tíðarserium. Trýstmátingar hava vit í tíðarskeiðinum 1890-2024. Tendensurin er at miðaltrýstið er støðugt.
Tíðarrøð o.a.	Veðurmátingar í Tórshavn
Atgongd til dátur	Sí undirsíður á www.vedur.fo
Tilmæli	Vit halda áfram at gera veðurmátingar fyri Føroyar og viðgera tær á best møguligan hátt
Samband	Turið Laksá Veðurstova Føroya turidl@vorn.fo www.vedur.fo
Framløga	Trýst her

Um ávísar fyri veðurlagsbroytingar	
Eyð Maritudóttir Grønadal, Hagstovan	
Samandráttur	Ein gjøgnumgongd av, hvussu veðurlagsávísarnir eru skipaðir, og hvussu veðurlagsbólkurin arbeiðir við hesum.
Tilmæli	Hagstovan mælir til, at miðað verður eftir, at allar uppgerðir taka støði í altjóða mannagongdum, soleiðis at vit tryggja altjóða sambæri. Harumframt at føroyskir stovnar samstarva, soleiðis at vit fáa sum mest burtur úr teimum dátum, sum longu eru tøkar.
Samband	Eyð M. Grønadal Hagstova Føroya eyd@hagstova.fo www.hagstova.fo
Framløgan	Trýst her

Turið Laksá, Veðurstova Føroya

Eyð Maritudóttir Grønadal, Hagstovan

Maria Gunnleivsdóttir Hansen, Umhvørvisstovan

DRÍVARAR // *DRIVERS*

Samlað útlát av vakstrarhúsgassi // Total greenhouse gas emissions

Samlað útlát av vakstrarhúsgassi frá tjóðarbúskapinum	
Maria Gunnleivsdóttir Hansen, Umhvørvisstovan	
Ávísi nr. 4	**Samlaða útlátið av vakstrarhúsgassi frá tjóðarbúskapinum //** *Total greenhouse gas emissions from the national economy*
Samandráttur	Árliga uppgerðin av útláti av vakstrarhúsgassi, sum Umhvørvisstovan á hvørjum ári umvegis DK fráboðar til Veðurlagsráðið, IPCC, verður gjørd upp eftir *territoriala* princippinum, sum m.a. merkir, at olja, sum t.d. útlendsk fiskiskip bunkra í Føroyum verður tald við, og at olja, sum føroysk skip og flogfør bunkra uttanlands, ikki telur við. Ávísi nr. 4 snýr seg um at gera upp útlát av vakstrarhúsgassi eftir *residentiala* princippinum, sum merkir, at alt útlát, sum hevur "rót" í føroyska tjóðarbúskapinum, verður roknað við, óansæð um útlátið fer fram í Føroyum ella í øðrum londum. Ávísin er áhugaverdur tí hann gevur okkum eina aðra og eina ofta meira viðkomandi mynd av føroyska útlátinum. Fyrsta royndin at gera føroyska útlátið av vakstrarhúsgassi upp eftir residentiala princippinum varð løgd fram á Veðurlagsdegnum 2025. Orsakað av, at allar viðkomandi dátur ikki eru tøkar, ber ikki til endaliga at staðfesta samlaða útlátið av vakstrarhúsgassi frá tjóðarbúskapinum. Ein varislig meting er tó, at útlátið er á leið tað sama, óansæð um uppgerðin byggir á territoriala ella residentiala princippið. Hetta veldst sjálvandi um, hvussu nógv olja verður bunkrað uttanlands, sum ikki er skrásett í verandi oljuhagtølum hjá Hagstovuni.
Tíðarrøð o.a.	Útlát av vakstrarhúsgassi, EIONET. Tøl fráboðað til IPCC.
Atgongd til dátur	www.us.fo – útlát av vakstrarhúsgassi.
Tilmæli	Mælt verður til, at viðkomandi dátur til at kunna rokna út ávísa nr. 4 gerast tøkar, t.d. olju, sum føroyskar fyritøkur bunkra í øðrum londum.
Samband	Maria Gunnleivsdóttir Hansen Umhvørvisstovan MariaGH@us.fo www.us.fo
Framløgan	Trýst her

ÁVIRKAN // *IMPACT*

Tekin um veðurlagsbroytingar // *Climate change evidence*

Hækkandi sjóvarmáli	
Sissal V. Erenbjerg, FIRUM og Hergeir Teitsson, Umhvørvisstovan	
Ávísi nr. 47	**Hækkandi sjóvarmáli** // *Sea-level rise*
Samandráttur	Ávísi 47 hevur heiti *hækkandi* sjóvarmáli og verður flokkaður sum *ávirkan* (en: impact). Evni er *tekin um veðurlagsbroytingar* í tema - *hav og strendur*. Mátihátturin er hæddarmáting, og eindin, ið mátað verður, er hæddarbroyting um árið. Ávísin verður tvíbýttur í globala og regionala relativa miðalhækking. Týðandi munur kann vera á lokalum og globalum sjóvarmálabroytingum. Føroyar liggja mitt í Norðuratlantshavi og eru tongdar at sjónum. Nógvar búsetingar - vinnuvirksemi, fornminni og infrakervi liggur við sjóvarmálan. Tí er føroyska samfelagið viðbrekið í mun til hækkandi sjóvarmála. Høvuðsorsøkirnar til hækkandi sjóvarmála eru bráðnandi ískápurnar í Grønlandi og Antarktis og økti hitin í sjónum. Hæddarmátingar við fylgisveinum (en: satellite altimetry) hava verið gjørdar síðan 1993. Nýggjar metingar av hesum dátum vísa eina miðalhækking um 2,1 mm/ár í 1992 og 4,5 mm/ár í 2024. Tað vil siga eina ferðøking í árligu globalu miðal-hækkingini. Ein avleiðing av hækkandi sjóvarmálanum er, at sonevndir ekstremir veðurtilburðir, ið fyrr hendu einaferð í hvørjari øld, fara í framtíðini at koma fyri 30 ferðir so ofta. Landsverk ger trýstmátingar inni í 7 føroyskum havnum, sum máta vatnstøðu. Hesir vatnstøðumátarar eru tó ikki nóg neyvt stillaðir (en: calibrated) til at týðiliga vísa broytingar í staðbundna sjóvarmálanum. DMI hevði ein vatnstøðumátara í Havn, sum mátaði frá 1957 til 2006. Yvir samlaða tíðarskeiðið vísti hesin eina miðalhækking á 2 mm/ár. Føroyski havmyndilin FarCoast vísir eina miðal sjóvarmálahækking á 2,9 mm/ár fyri tíðarskeiðið 1999-2023, og samsvarar hetta væl við globalu miðalhækkingina. Sameining av staðbundnum vatnstøðumátingum við GNSS mátingum frá GNSS støðunum hjá Umhvørvisstovuni kunnu geva eina meting av absoluttu broytingunum í sjóvarmálanum við Føroyar. Fylgisveinahæddarmátingar vísa týðiliga, at globali sjóvarmálin hækkar, at hækkingin økist, og er hetta ein av mest kollveltandi ávirkanunum av veðurlagsbroytingunum. Føroyski sjóvarmálin hækkar uttan iva eisini, men fyri at gera ávísan neyvt upp er neyðugt at arbeiða meira við dátunum hjá Landsverki og at sameina hesar við søguligu mátingunum hjá DMI og við eftirlíkningum (en: simulation) frá havmyndlum sum FarCoast.
Tíðarrøð o.a.	- DMI vatnstøðumátingar (1957-2006) - Landsverk vatnstøðumátingar, trýstmátingar í 7 havnum síðan 2009. - GNSS mátingar á teimum 4 GNSS-støðunum hjá Umhvørvisstovuni vísa, at Føroyar søkka 0,2-0,3 mm/ár. Tíðarrøðirnar eru ymiskar í longd, har tann longsta er av ARGI støðini, sum hevur mátað síðan 2010.

	- FarCoast tíðarrøð við eftirlíknaðum myndladátum (1999-2023) frá Firum
Atgongd til dátur	- DMI dátur: https://psmsl.org/data/obtaining/rlr.monthly.data/839.rlrdata - Landsverk dátur: https://lv.fo/database/ - GNSS dátur: https://dataforsyningen.dk/data/4793, https://www.epncb.oma.be/_networkdata/siteinfo4onestation.php?station=ARGI00FRO
Tilmæli	Mælt verður til víðari greining av føroyskum vatnstøðumátingum. Miðað skal vera ímóti at sameina tíðarrøðina hjá DMI við núverandi vatnstøðumátingar í Havn, fyri at kunna greina mátingarnar betur og somuleiðis framhaldandi leggja afturat longu tíðarrøðini við nýggjum mátingum. Greining av GNSS-dátunum saman við vatnstøðumátingunum skal ástøðiliga geva somu ábendingar um hækkandi sjóvarmála í føroyska sjóøkinum, sum fylgisveinahæddarmátingar vísa. Verða hesi tilmæli fylgd, verður gjørligt at áseta bæði eina relativa og absolutta meting av hækkandi sjóvarmála í Føroyum og í føroyskum sjóøki. Metingin verður styrkt av samanberingini við FarCoast havmyndlinum. Neyvari greining av hækkandi sjóvarmálanum í Føroyum hevur stóran týdning, tá ið meira vitan kann brúkast til at gera forsagnir um staðsetingina av framtíðar sjóvarmálanum í Føroyum. Slík vitan og atlit til hesa vitan hevur alstóran týdning í framtíðar bygging, fyribyrging og menning av infrakervinum sum heild.
Samband	Sissal V. Erenbjerg Telduhavfrøðingur, ph.d. Firum sissal@firum.fo www.firum.fo Hergeir Teitsson Jarðmátingarfrøðingur, ph.d. Umhvørvisstovan hergeirt@us.fo www.us.fo
Framløgan	Trýst her



Hergeir Teitsson, Umhvørvisstovan

Sissal V. Erenbjerg, FIRUM

Miðalsúrleiki í sjógvi	
Undirheiti: Havsúrgan – óndi tvíburin hjá veðurlagsbroytingunum	
Ian Salter, Havstovan	
Ávísi nr. 47	**Miðalsúrleiki í sjógvi (pH) mátað á ávísum umboðandi dátustøðum** // *Average marine acidity (pH) measured at agreed suite of representative sampling stations*
Samandráttur	Hesin ávísin fylgir við havsúrleika á umboðandi støðum í føroyskum sjógvi. Havsúrleiki, ið stavar frá vaksandi CO_2 innihaldi í lofthavinum, førir til eina langtíðar lækking (áratíggjur) av pH í havinum. Hetta ávirkar eitt nú korallir, skeljadýr og smáfisk. Hetta er serliga viðkomandi fyri Føroyar, har búskapurin er bundin at tilfeingi úr havinum og aling í sjógvi. Í løtuni eru ikki nóg nógv hagtøl til álitandi at meta um ávísan í føroyskum sjógvi, og tøku hagtølini vísa stórar broytingar.
Tíðarrøð o.a.	Navn á tíðarrøð: Havstovan carbonate chemistry monitoring Tíðarskeið: 2015-2018 / 2021 Eigari: Havstovan *Viðmerking: Glopp er í tíðarrøðini og tíðarrøðin er eisini mátað við tveimum ymiskum tólum. Tað ger tað torført at samanbera tølini.*
Tilmæli	Tilmæli: Verandi tilmæli er at víðka dátuinnsavningina. Hvør: Havstovan Hví: Verandi ætlan savnar sýnir fýra ferðir um árið á sonevndum standardskurðum, sum ganga út frá landgrunninum, og sum eru partur av umhvørvisyvirvøkuni hjá Havstovuni. Vegna stóra arbeiðsbyrðu við innsavnan og greining av sýnum verða bert fá afturvendandi støð kannað; hesi støð hava stórar broytingar í súrleika. Hetta avmarkar møguleikarnar at rokna eitt álítandi miðal pH í havinum og fevnir ikki um landgrunnin, har lívfrøðilig árin eru størst, t.d. á yngul og alivinnu. Landgrunnurin varð ikki tikin við í upprunaligu ætlanina, tí tað hevði kravt ov nógv sýnir at nágreina natúrligar broytingar. Hetta ber ikki til við einstøkum sýnisgreiningum. Einasta praktiska loysn er at brúka sjálvvirkandi mátitól við rannsóknarskipi og ferðamannaskipum. Í løtuni finst eingin skipaður háttur at fíggja infrastruktur og førleikamenning í Føroyum. Havstovan hevur fleiri ferðir roynt at fáa uttanhýsis stuðul til at bøta um yvirvøkuna av havsúrgan, men hetta hevur verið niðurraðfest í metingarnevndum. Íløgur í mátitól eru neyðugar fyri at tryggja ávísan.
Samband	Ian Salter Havstovan IanS@hav.fo https://www.hav.fo/-havid/havsurgan
Framløgan	Trýst her

Útbreiðsla og støða hjá sløgum *// Distribution and status of species*

Reyðlistavísital	
Áki Vang, Tjóðsavnið	
Ávísi nr. 63	**Reyðlistavísital** *// Red list index*
Samandráttur	Reyðlistavísitalið mátar broyting í samlaða oyðingarvandanum tvørtur um bólkar av plantu- og djórasløgum. Tað er grundað á veruligar broytingar í tali av sløgum í hvørjum bólki av oyðingarvanda á listanum hjá IUCN, reyðlistanum (Altjóða Náttúruverndarfelagsskapurin, www.iucnredlist.org). Ein reyðlisti kann gerast við antin at nýta almennu bólkingina hjá IUCN, ella at gera eina bólking eftir staðbundnum dátum. Ein roynd at gera ein føroyskan reyðlista fyri plantur og fugl varð gjørd í 2005 (Anna Maria Fosaa, Magnus Gaard, Janus Hansen). Hagstovan hevur á síni heimasíðu roknað reyðlistavísitalið fyri nøkur súgdjóra- og plantusløg tíðarskeiðið 1993-2020. Hetta er gjørt við almennu bólkingini. Vísitalið vísir eitt lítið neiligt rák yvir tíðarskeiðið. Hetta merkir, at talið av sløgum, sum verða flutt í bólkar við størri oyðingarvanda hækkar.
Atgongd til dátur	https://sdg.hagstova.fo/sdg-site/15-5-1/ https://www.iucnredlist.org/
Tilmæli	Skal ein fullfíggjaður reyðlisti gerast, so reyðlistavísitalið kann roknast, er neyðugt at teir stovnar, sum umsita dátur um lívfrøðiliga fjølbroytni í Føroyum samstarva um hetta arbeiðið.
Samband	Áki Vang Tjóðsavnið Aki@savn.fo www.tjodsavnid.fo
Framløgan	Trýst her

Áki Vang, Tjóðsavnið

Ian Salter, Havstovan

Veðurlagsbroytingar og alneyðugt infrakervi //
Climate change impacts on transport and critical infrastructure

Veðurlagsbroytingar og ávirkan á flutning	
Sølvi Sjúrðarson, Landsverk og Árni Jacobsen, Landsverk	
Ávísi nr. 77	**Veðurlagsbroytingar og ávirkan á flutning //** *Impacts of climate change on transport*
Samandráttur	Ávísi nr. 77 verður nýttur til at meta um vandar og avleiðingar av veðurlagsbroytingum við flutningi. Hvussu veðurfyribrigdi - stormar, hækkandi sjóvarmáli og hitabroytingar - ávirka flutning, trygd og hvussu nógv vegakervið tolir. Í Føroyum hava vit vegir við sjóvarmálan, í dølum og í fjøllunum og ofta við fjallalíðir. Nakrar dátur eru tøkar, men neyðugt er at arbeiða víðari við hesum Vatnstøða er hækkandi. Hvørt ár eru omanlop, áarlop, skriðulop, skalvalop og brim, sum ávirka flutningskervi í størri og minni mun.
Tíðarrøð o.a.	Vatnstøðumátingar Tíðarskeið: 2010-2025 Eigari: Landsverk
Atgongd til dátur	Https://lv.fo/database
Tilmæli	Tilmæli um at fara undir/halda fram við/víðka at savna dátur fyri vatnstøðu, áhaldandi váðameta í mun til, hvar lop og brim kunnu væntast. Hvør? Landsverk Hví? Tryggja framkomuleika og forða/fyribyrgja skaðum á og flutningsnetið.
Samband	Sølvi Sjúrðarson og Árni Jacobsen Landsverk lv@lv.fo https://landsverk
Framløgan	Trýst her

Árni Jacobsen, Landsverk

Sølvi Sjúrðarson, Landsverk

VIÐBREKNI // *VULNERABILITY*

Øki viðbrekin fyri veðurlagsbroytingum //
Area of country vulnerable to climate change

Oyggjar viðbreknar fyri veðurlagsbroytingum	
Lis Mortensen, Jarðfeingi	
Ávísi nr. 107	**Oyggjar viðbreknar fyri veðurlagsbroytingum** // *Islands vulnerable to climate change*
Samandráttur	Fløðandi alheims-sjóvarmáli rakar láglendir í oyggjum og elvir til yvirflóð og erosión. Hetta er eisini galdandi í Føroyum. Ávísi 107 byggir á mátingar av vídd av landi og sjóhædd (árligar mátingar). Sjóvarmálin hækkar støðugt, og hetta er umráðandi at hava atlit til í mun til láglendir, útbygging av vegakervi og aðra bygging nær við sjóvarmálan. Umhvørvisstovan hevur neyvar dátur fyri vídd og topografi yvir allar Føroyar. Landsverk ger mátingar av vatnstøðu í ymsum støðum kring landið. Dáturnar vísa, at sjóvarmálin er spakuliga og støðugt fløðandi.
Tíðarrøð o.a.	**1) Víddir av lendi og hædd yvir sjóvarmálan.** **2) Vatnstøða.** Tíðarskeið: Vatnstøðan verður mátað 10. hvørt minutt. Mátað verður á 7 ymiskum støðum kring landið, og tíðarrøðirnar eru ofta í mesta lagi 15 ára langar. Í mars 2025 verður mátað á hesum 7 støðum: • Gamlarætt (VS-13) • Sørvágur (VS-14) • Eiði (VS-15) • Ánirnar (VS-16) • Fuglafjørður (VS-17) • Krambatanga (VS-18) • Tórshavn (niðurlagdur) (VS-19) • Tórshavn, ískai (VS-20)
Atgongd til dátur	1) Víddir og topografi: Umhvørvisstovan (us.fo og kortal.fo) 2) Vatnstøðumátingar. Landsverk (kontakt: Sølvi Sjúrðarson)
Tilmæli	Mælt verður til at gera alment atkomiliga GIS-kortskipan, sum vísir hvørji økir í Føroyum verða rakt av fløðandi sjóvarmála. Eitt dømi um slíka skipan sæst fyri Hawaii: https://www.pacioos.hawaii.edu/shoreline/slr-hawaii/ Meginparturin av dátunum til skipanina finnast longu, og aðrar dátur sum mangla, sum t.d. dátur um stranda erosión kunnu fáast til vega. Stovnar, sum kundu gjørt hetta arbeiðið eru t.d. Umhvørvisstovan, Jarðfeingi og Landsverk.
Samband	Lis Mortensen Jarðfeingi LisM@jf.fo www.jf.fo
Framløgan	Trýst her

ÁTØK // *MITIGATION*

Veðurlagsbroytingar - politikkir og ætlanir um átøk //
Climate change mitigation policies, strategies and plans

Orku- og veðurlagspolitikkir	
- og ætlanir at minka munandi um útlátið av vakstrarhúsgassi.	
Sigurð í Jákupsstovu, Umhvørvisstovan	
Ávísi nr. 114	**Ætlanir at minka munandi um útlátið av vakstrarhúsgassi** // *Low-carbon development strategies and plans*
Samandráttur	Sambært § 4, stk. 19 í París-sáttmálanum "*skulu allir partar til sáttmálan stremba eftir at orða og boða frá langtíðar menningarætlanum at minka útlátið av vakstrarhúsgassi, havandi í huga § 2, har hædd verður tikið fyri teirra felags tó ymisku ábyrgd og hvør í sínum føri ymisku evnum, sæð í ljósinum av ymsum nationalum umstøðum*". Ætlanirnar verða á enskum nevndar "Long Term - Low Emission Development Strategies, LT-LEDS. Fyri Føroyar hava vit valt at vísa á Orku- og veðurlagspolitikkin, sum var samtyktur á Føroya Løgtingi tann 5. mai 2022. Orku- og veðurlagspolitikkurin hevur 23 átøk, sum skulu stuðla undir, at útlátið í 2032 verður 30 % lægri enn útlátið av vakstrarhúsgassi í 2010. Í framløguni varð komið inn á tey ymisku átøkini samtykt við eini meting av, hvussu tað gongur at fremja átøkini. Samanumtikið vísa tøl fyri elframleiðslu og -nýtslu og tøl fyri oljusølu, at elframleiðslan úr vindi síðan 2020 til 2024 er sera nógv vaksin og at oljusølan á landi sama tíðarskeið er minkað 12 %. Fyri bólkin *Húsarhald og felagsskapir* er oljusølan minkað 24 %. Hinvegin er munandi vøkstur í oljusøluni til skip, tilsamans 17 %.
Tilmæli	Tørvur er á at endurskoða orku- og veðurlagspolitikkin og at leggja nýggj átøk afturat
Samband	Sigurð í Jákupsstovu Umhvørvisstovan SigurdJ@us.fo www.us.fo
Framløgan	Trýst her

Lis Mortensen, Jarðfeingi

Sigurð í Jákupsstovu, Umhvørvisstovan

Stuðul til steinrunnin brennievni í Føroyum	
Hans Ellefsen, Fróðskaparsetur Føroya	
Ávísi nr. 115	**Reformera ella útfasa almennan stuðul til steinrunnin brennievni //** *Reforming or phasing out of government support for fossil fuels*
Samandráttur	Ávísin snýr seg um at greina og skráseta almennan stuðul til fossil brennievni, býtt eftir slagi av brennievni (t.d. olja, gass, kol) og stuðulsformi (beinleiðis flytingar, skattalætta o.a.). Endamálið er at fremja gjøgnumskygni, betri politiskar avgerðir og at stuðla arbeiðinum við heimsmálunum. Ávísin er viðkomandi fyri Føroyar, tí her er eisini almennur stuðul til fossil brennievni, eitt nú við undantøkum frá brennioljugjaldi fyri fiskiflotan. Dáturnar vísa, at nógv lond enn stuðla fossila orku, serliga í krepputíðum. Men ávísin undirstrikar týdningin av at fasa út slíkan stuðul og umleggja til grøna orku og burðardygga menning.
Tilmæli	Føroyski fiskiflotin er í dag undantikin brennioljugjaldi á 1 kr/l, sum allar aðrar vinnur í landinum rinda. Hetta kann metast sum ein goymdur stuðul til fossilt brennievni. Grannalondini hava sett í verk CO_2-gjøld fyri fiskiflotan: Noreg hevur eitt avgjald á 3,17 NOK/l, men veitir endurgjald, sum tó ikki er stigvíst minkað sum ætlað. Effektivt gjalda norsk fiskiskip umleið 2 NOK/l. Ísland hevur hækkað oljugjaldið munandi seinnu árini, og liggur teirra á umleið 1 kr/l í 2025. Danmark setti CO_2-gjald á oljuna hjá fiskiflotanum frá 2025 við stigvíst minkandi endurgjaldi, har gjaldið eftir kompensatión verður umleið 1,1 kr/l í 2025. Tað, at vit í Føroyum einki gjald hava, svarar til 85 mió. kr. í stuðli, sum hevði komið inn um brennioljugjaldi á 1 kr/l var galdandi fyri fiskiflotan. Eiga vit ikki í Føroyum at fylgja grannalondunum og seta CO_2-gjald á fiskiflotan, tó kanska við ymiskari tilgongd fyri ymsar skipabólkar og í samband við eina breiðari grøna umlegging?
Samband	Hans Ellefsen Fróðskaparsetur Føroya hanse@setur.fo www.setur.fo
Framløgan	Trýst her

TILLAGING // *ADAPTATION*

Yvirvøka av veðurlagsbroytingum // *Climate change monitoring*

Skipan av veðurmátingum	
Bárður A. Niclasen, Veðurstova Føroya	
Ávísi nr. 151	**Skipan av veðurmátingum** // *Meteorological monitoring network*
Samandráttur	Ávísi 151 (Climate change monitoring: Meteorological monitoring network) lýsir í hvønn mun londini hava nøktandi skipan, so veðurmáti-støðir kunnu brúkast til at halda eyga við veðurlagsbroytingum. Samanhangandi veðurmátingar hava verið gjørdar fyri Tórshavn/Hoyvík síðan oktober 1872. Stað og tøkni eru broytt nakað við tíðini, men vit hava eina nøktandi tíðarseriu. Í dag verður arbeitt fram móti at lúka øll World Meteorologival Organization (WMO) krøv á fleiri lokalitetum, so mátingarnar kunnu stuðla hvør aðrari. Mátingar vísa, at hitin er vaksandi og regnmongdin tykist støðug. Vitanin um broytingar í vindviðurskiftum er minni eftirfarandi, tí lendi á ymiskum mátistøðum gjøgnum tíðina ávirkar nógv.
Tíðarrøð o.a.	Veðurmátingar í Tórshavn
Atgongd til dátur	Sí undirsíður undir www.vedur.fo
Tilmæli	Hildið verður á at gera veðurmátingar, sum liva upp til galdandi WMO krøv
Samband	Bárður A. Niclasen Veðurstova Føroya bardurn@vorn.fo www.vedur.fo
Framløgan	Trýst her

Hans Ellefsen, Fróðskaparsetur Føroya

Bárður A. Niclasen, Veðurstova Føroya

Samanumtøka

Marita Rasmussen, stjóri á Havstovuni, tók samanum Veðurlagsdagin 2025

Marita helt, at nógv áhugavert var komið fram á degnum, og tí var ikki so einfalt at taka samanum.

Marita vísti á, at eins og á Veðurlagsdegnum í fjør, var ein yvirskrift í dag eisini, um veðurlagið er broytt. Tað regnar meira, tá tað regnar, og hitin í dýpunum er hækkaður. Tað hevur týdning at hava eftirfarandi tíðarrøðir og gera fleiri og meira miðvísar kanningar.

Hvørja ávirkan hevur broytta veðurlagið? Tað hevur týdning, at vit eru fyrireikað til at handfara, at tað eru broytingar í veðurlagnum, sum aftur hava avleiðingar fyri planleggingina her á landi.

Marita vísti til áhugavert kjak á degnum, sum snúði seg um, hvussu man í lóggávu hevur skipað loyvisumsiting í fiskivinnuni, og hvussu tað ber til at ávirka atburðin hjá loyvishavum og teirra orkunýtslu. Marita helt, at hetta evnið hevði uppiborið størri rúmd og at tey, sum kenna til hetta, kundu sett seg saman ein seinnapart.

Viðvíkjandi framløguni um orku- og veðurlagspolitikk, so helt Marita, at tað var áhugavert og gott at síggja, at tað serliga er í regluverkinum, at tað er hent okkurt, at tað eru politikkarar sum hava roynt at innfría. Tað fer at vísa seg í verki, um tað fer at ávirka okkara atburð og okkara útlát

Marita endaði við at staðfesta, at Veðurlagsdagurin 2025 hevði verið ein øgiliga góður dagur við einum góðum strukturi.

Marita Rasmussen, Havstovan